

## Tónleikur

# »Land« í eygsjón

**Ein av føroysku bólkunum, ið ger mest um seg úti um landoddarnar, er Týr. Vit hoyra ikki nógv um Týr her á landi, men bólkurin hevur ógvuliga nógva framgongd úti í heimi, ið m.a sæst aftur í teirra imponerandi langa lista av konsertferðum. Í mai kemur nýggj fløga út**

ÚTGÁVA
*Sunneva H. Eysturstein*
*seysturstein@gmail.com*

Á heimasíðuni hjá Týr (tyr.net) stendur, at nýggj fløga kemur út í mai. Hon eitur »Land« og inniheldur føroysk, íslendsk og norsk siðbundin løg, ið eru útsett til heavy metal. Harumframt eru eisini nýggjari løg á útgávuni, ið sumt vant innihalda siðbundin element.

**Skandinavisk søga og ósvaraðir spurningar**
Næstan øll løgini á »Land« taka støði í føroyskari ella norskari søgu. Siðbundnu føroysku tekstirnir síggjast í løgum sum »Gátu Ríma«, »Fípan Fagra«, »Lokka Táttur« og »Gandakvæði Tróndar«, ið er ein yrking eftir J. H. O. Djurhuus. Norsku siðbundnu tekstirnir eru m.a »Sinklars Vísa«, meðan onnur løg, sum t.d »Ocean« er meira jarðbundið og reflekterast ikki beinleiðis úr víkingatíðini. »Ocean« snýr seg um møguligar orsøkir til, hví skandinavar sigldu til Føroyar á sinni. Ein spurningur, sum enn í dag stendur ósvaraður.

**Nýggjar hæddir**
Myspace profilurin hjá útgávufelagið Týrs, Napalm Records, sigur, at »Land« tónleikaliga sæð verjir kjarnan av tí, sum er mest heilagt fyri Týr: Hetju Víkinga Metal við stórum íblásturi frá siðbundnum skandinaviskum løgum, ið eru sett saman við metal. Og at serstaka sangskrivingin hjá Hera Joensen saman við ótrúliga dugnaligum samanspæli gevur eina uppliving »that reaches new heights with every listen«.

»Land« kemur á fløguhillarnar tann 30. mai og verður at fáa sum vanlig fløga og sum avmarkað útgáva við bonus DVD frá livekonsert hjá Týr á Wacken Open Air.

Les meira á tyr.net, napalmrecords.com ella myspace.com/napalmrecords.




*Húsin: Nýggja fløgan frá Týr, »Land«, kemur á fløguhillarnar tann 30. mai sum vanlig fløga og sum avmarkað útgáva við bonus DVD*



*»Land« inniheldur føroysk, íslendsk og norsk siðbundin løg, umframt nýggjari løg, ið innihalda siðbundin element*



*Tónleikurin hjá Týr er lýstur sum hetjuligt víkinga metal við íblásturi frá siðbundnum skandinaviskum løgum*